# Ársfrágreiðing

# 2022

Brúkaraumboðið



# Innihaldsyvirlit

**Um Brúkaraumboðið** .......... **2**

**Brúkaravernd** .......... **4**

**Virksemið í 2022** .......... **6**

**Ávís útvald mál í 2022** .......... **7**

Kapittul 1: Villleiðandi marknaðarføring .......... 8

- Tilboðsprísur uttan mvg .......... 8
- Brúkaraumboðið viðgjørt mál um upprunaprís á tilboðsvøru .......... 9
- Hotell broytti sølulýsing eftir áheitan frá Brúkaraumboðnum .......... 10

Kapittul 2: Óumbidnar áheitanir .......... 11

- Kappingar á sosialum miðlum .......... 11
- Óumbidnar áheitanir til kundar hjá øðrum fjarskiftisveitara .......... 12

Kapittul 3: Samanberandi lýsingar .......... 13

- Klædnahandil samanbar prísir við kenda lágprís handilsketu .......... 13

Kapittul 4: Lýsingar skulu vera á føroyskum máli .......... 14

- Lýsingar beinleiðis ætlaðar brúkarum í Føroyum skulu vera á føroyskum .......... 14

Kapittul 5: Forhandarmeting .......... 15

- Bilasøla spurdi Brúkaraumboðið um forhandarmeting .......... 15

Kapittul 6: Stakroyndir .......... 16

- Stakroyndir av tilboðsbløðum .......... 16

Kapittul 7: Gjaldslóg .......... 17

- Skylda at taka ímóti reiðum peningi .......... 17
- Keyp á netinum, ikki fingið vøruna .......... 18
- Elektroniskt gávukort .......... 18

**Vegleiðingar/kunning** .......... **20**

Kappingar á sosialum miðlum .......... 21

Black Friday – góð ráð .......... 23

Tóm orð skulu ikki brúkast í marknaðarføring - Greenwashing .......... 24

Norðurlendsku brúkaraumboðini hittust í Føroyum .......... 25

# UM BRÚKARAUMBOÐIÐ

Brúkaraumboðið varð sett á stovn 1. januar 2009, tá lóg um marknaðarføring varð sett í gildi.

Missiónin hjá Brúkaraumboðnum er at umsita lóg um marknaðarføring. Í tí sambandi hevur Brúkaraumboðið eftirlit við, at lógin og reglur við heimild í lógini verða hildnar.

Visiónin hjá Brúkaraumboðnum er, at Brúkaraumboðið er eitt vælvirkandi eftirlit við høgari fakligari góðsku, ið ger sítt til at fáa tilvitaðar brúkarar, ið kunnu keypa á einum einfaldum og tryggum marknaði.

Yvirskipaða endamálið við marknaðarføringarlógini er at tryggja, at marknaðarføring, umframt aðrir partar av vinnuvirksemi, verða framd á ein hóskandi og rímiligan hátt, har atlit verða tikin til áhugamálini hjá øðrum vinnurekandi, brúkarunum og samfelagnum yvirhøvur. Hetta skal í fyrsta lagi tryggjast gjøgnum heildartreytina í lógini um, at vinnurekandi skulu virka eftir góðum marknaðarføringarsiði. Ein meginregla í lógini er, at atlitið til áhugamálini hjá vinnurekandi, brúkarunum og samfelagnum eru javnsett.

Virksemið hjá Brúkaraumboðnum er at hava eftirlit við, at vinnurekandi og stovnar halda marknaðarføringarlógina, og at fremja góðan marknaðarføringarsið til frama fyri brúkaran.

Eftirlitið er býtt í tveir partar. Tann fyrsti parturin eru innkomnar klagur ella mál, sum Brúkaraumboðið kann taka upp av sínum eintingum.

Hin parturin er fyribyrgjandi og upplýsandi. Brúkaraumboðið skal royna at ávirka vinnurekandi og stovnar at virka eftir góðum marknaðarføringarsiði og yvirhøvur at halda lógina við at gera og almannakunngera leiðreglur um marknaðarføring á økjum, sum hava stóran týdning, serliga fyri brúkaran.

Brúkaraumboðið kann gera forhandarmeting um ætlað marknaðarføringartiltøk kunnu metast at vera lóglig ella ikki. Tað vil siga, at Brúkaraumboðið kann fáa tilfar og lýsingar sendandi fyri at fyribyrgja, at nakað kemur skeivt fyri, tá ið marknaðarføringartiltøk verða sett í verk.

Í marknaðarføringarlógini er ásett ein samráðingarmeginregla. Tí er meginreglan, at Brúkaraumboðið fer samráðingarvegin at loysa mál, áðrenn onnur tiltøk sum t.d. áleggingar, forboð og rættarmál verða sett í verk.

Tann 1. juli 2021 fekk Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om betalinger (gjaldslógin) gildi. Brúkaraumboðið hevur eftirlit við, at ávísar reglur í gjaldslógini verða hildnar.
Nýggju uppgávurnar hjá Brúkaraumboðnum fevna m.a. um at viðgera mál, fyrispurningar og klagur, sum hava við gjaldstænastur og elektroniskan pening at gera. Eisini hevur Brúkaraumboðið eftirlit við "Kontantregluni", sum skal tryggja borgarum møguleika at rinda kontant.

Tann 1. november 2022 fekk Brúkaraumboðið nýggjan stjóra. Rannvá Sólheim avloysti tá Rannvá Ragnarsdóttir í stjórastarvinum.

Rannvá Sólheim er 51 ára gomul, er útbúgvin løgfrøðingur og hevur drúgvar royndir, bæði úr vinnuni og almennu umsitingini.

Rannvá starvaðist fleiri ár hjá Føroya Tele og í Dátueftirlitinum, áðrenn hon fór í starv sum løgfrøðingur í Løgtinginum, har hon var í 10 ár.

Seinastu tíðina hevur Rannvá starvast sum løgfrøðingur í Fiskimálaráðnum, áðrenn hon tók við sum brúkaraumboð tann 1. november 2022.

Stovnurin heldur til á Skálatrøð í Tórshavn, har onnur eftirlit eisini húsast.

Brúkaraumboðið samstarvar við norðurlendsku brúkaraumboðini um felags avbjóðingar og um felags sjónarmið og leiðreglur. Brúkaraumboðið luttekur vanliga á norðurlendskum fundum.

Játtanin fyri 2022 var 1.353 mió. kr.
Hetta var 200.000 kr. hægri enn árið fyri.

Orsøkin til hækkanina eru øktar arbeiðsuppgávur í sambandi við nýggju gjaldslógina.




Rannvá Sólheim, høgrumegin á myndini, avloysir Rannvá Ragnarsdóttir.

# BRÚKARAVERND

Brúkaraumboðið hevur sum fremstu uppgávu at hava eftirlit við, at lóg um marknaðarføring verður hildin. Partur av hesum arbeiði vil eisini vera at bøta um viðurskiftini millum vinnurekandi og brúkaran.

At hava fingið skipaðar karmar og spælireglur fyri marknaðarføring, leggur støðið fyri framferðarhættir hjá vinnurekandi á marknaðinum. Tá marknaðarføringslógin varð fyrireikað, var semja í arbeiðsbólkinum um, at um lógin skal fáast at virka eftir ætlan, má fígging setast av at umsita lógina, undir hesum, at røkja tær eftirlitsuppgávur, sum verða nevndar í lógaruppskotinum. Mett varð, at tað eftir støddini á føroyska samfelagnum krevst ein umsitingarlig eind við trimum fólkum at umsita marknaðarføringarlógina. Brúkaraumboðið hevur í undanfarnu ársfrágreiðingum víst á, at brúkaraverndin ikki verður fult røkt við stórt sæð einum starvsfólki á Brúkaraumboðnum. Til at røkja áhugamálini hjá tí einstaka brúkaranum krevst meiri. Tað er langt eftir á mál til vit hava eina skipan, sum gevur nøktandi brúkara vernd.

Tá ongi ítøkilig stig eru tikin til tess at styrkja brúkaraverndina á teimum økjum, ið Brúkaraumboðið áður hevur mælt til, verða tilmælini endurnýtt.

## Brúkarakærunevnd

Í fyrsta lagi mælir Brúkaraumboðið til, at sett verður á stovn ein brúkarakærunevnd. Ein brúkarakærunevnd skal viðgera kærur frá brúkarum um keyp av vørum og tænastum.

Eftir verandi skipan kann ein brúkari, ið er komin illa fyri av einum keypi, bert fara umvegis dómstólarnar, og kann hetta gerast drúgt og kostnaðarmikið fyri brúkaran.

Ein brúkarakærunevnd kundi verið mannað við umboðum fyri brúkarar og vinnurekandi. Eftir nærri ásettum reglum kundi ein brúkarakærunevnd viðgjørt kærur um keyp og sølu og tikið avgerð í málum.

Hetta vildi bøtt um verndina hjá brúkaranum og verið ein skjót og smidlig skipan, sum hevði hjálpt bæði vinnurekandi og brúkarum.

## Nethandil

Í dag fer stór menning fram innan talgilding og KT, og eitt øki, sum støðugt vindur upp á seg, er handil á netinum. Á hesum umfatandi marknaði er brúkaraverndin í Føroyum ikki skipað og ofta tilvildarlig.

Brúkaraumboðið mælir til, at reglur um nethandil verða settar í verk. Í hinum Norðurlondum kann brúkarin iðra sítt netkeyp. Brúkaraumboðið mælir tí til, at reglur um iðranarrætt verða settar í gildi í Føroyum. Tað merkir, at ein keypari, sum hevur keypt eina vøru á netinum, kann iðra keypið og senda vøruna aftur og fáa peningin aftur.

Brúkaraumboðið vísir eisini á, at krøv eiga eisini at verða sett til seljarar á netinum um at upplýsa fullfíggjaðan prís umframt keyps- og garantitreytir.

## Rák í samfelagnum

Arbeiðið hjá Brúkaraumboðnum avspeglar í stóran mun menningina og rákið í føroyska samfelagnum. Eisini norðurlendsk og altjóða rák hava sína ávirkan á brúkarar og vinnurekandi í Føroyum, og hava tí eisini týdning fyri virksemið.

Eitt evni, sum Brúkaraumboðið fer at taka upp í næstum, eru fjaldar lýsingar á sosialum miðlum. Marknaðarføringin í dag hevur í størri mun flutt seg yvir á aðrar talgildar pallar, t.d. bloggar og sosialar miðlar. Umrøða av vørum og tænastum kunnu ofta skapa meira álit millum brúkarar enn ein sølulýsing í einum prentaðum miðli. Lógarásetingin um lýsingaidentifikasjón ella fjalda lýsing, er tí serliga týdningarmikil í samband við marknaðarføring á sosialum miðlum.

Greenwashing er eitt altjóða heiti, ið verður nýtt, tá vinnurekandi marknaðarføra eitt nú egnar vørur sum verandi meira umhvørvisvinarligar ella burðardyggar enn tær í veruleikanum eru. Hetta rákið er eisini kent um okkara leiðir, og fer Brúkaraumboðið at halda eitt vakið eyga við hesum.

Afturat marknaðarføringslógini hevur Brúkaraumboðið eftirlit við einum parti av gjaldslógini. Gjaldslógin kom í gildi í Føroyum tann 1. juli 2021. Brúkaraumboðið fer í næstum at kunna nærri um reglurnar viðvíkjandi elektroniskum gávukortum, um rættin at rinda kontant og um møguleika at fáa pening afturgoldnan í ávísum førum, tá keypt verður á netinum.

Tórshavn, tann 15. august 2023



Brúkaraumboðið
Rannvá Sólheim

# VIRKSEMIÐ Í 2022

Í 2022 vórðu skrásett 58 mál.

Av hesum vóru 31 kærur, 18 fyrispurningar/forhandarmetingar og 9 mál av øðrum slag.














# Ávís útvald mál í 2022

# KAPITTUL 1

## VILLLEIÐANDI MARKNAÐARFØRING

### Tilboðsprísur uttan mvg

Bilasøla hevði lýsing á Facebook, sum Brúkaraumboðið metti vera í stríð við marknaðarføringslógina. Talan var um eina lýsing, har listaprísur fyri ein plug-in hybrid bil, varð upplýstur við mvg, í meðan tilboðsprísurin varð vístur uttan mvg.

Sambært § 13 í lóg um marknaðarføring skal prísur, tá selt verður til brúkarar, upplýsast við mvg. Brúkaraumboðið vísti á, at afturat hesum er møguligt eisini at vísa upphæddina, tá mvg´ið er endurgoldið ella at upplýsa um møguleikan at fáa mvg´ið lutvíst aftur. Prísurin við mvg skal tó síggjast týðiliga í mun til aðrar upplýsingar í marknaðarføringini.

Tá ein samanbering verður gjørd millum listaprís og tilboðsprís, skal talan verða um samanberiligar prísir soleiðis, at brúkarin hevur eitt og sama grundarlag at meta prísin út frá. Tað vil siga, at báðir prísirnir skulu verða upplýstir við mvg. Báðir prísirnir kunnu harafturat upplýsast, tá loyvdi parturin av mvg´num er afturborin.
Brúkaraumboðið metti ikki at tað er rætt, at bilasølan brúkar orðingina ”u/MVG”, tí at talan er í hesum føri um prís, har mvg´ið bert lutvíst kann verða endurgoldið (max 70.000 kr.).

Brúkaraumboðið metti lýsingina vera villleiðandi marknaðarføring (sbrt. § 3, stk. 2 í marknaðarføringslógini) og ikki góður marknaðarføringssiður (sbrt. § § 1, stk. 1 í marknaðarføringslógini), soleiðis sum listaprísur og tilboðsprísur er uppsett, har listaprísur er upplýstur við mvg í meðan tilboðsprísur er upplýstur uttan mvg. Bilasølan greiddi frá, at tey høvdu nýggj fólk á søludeildini og at talan var um eitt mistak. Bilasølan broytti lýsingina sama dag.

Brúkaraumboðið var eisini vorðin varug við aðrar lýsingar hjá somu bilasølu. Bilasølan lýsti við tilboðum, uttan at upplýsa upprunaprís. Brúkaraumboðið vísti á, at tá talan er um tilboð, eigur undanprísurin (vanligi prísurin) eisini at verða upplýstur, soleiðis at brúkarin kann síggja, um talan er um eitt gott tilboð og hvussu nógv hann sparir. Bilasølan rættaði lýsingarnar, so at tær vóru í tráð við marknaðarføringslógina.

## Brúkaraumboðið viðgjørt mál um upprunaprís á tilboðsvøru

Brúkaraumboðið fekk fráboðan um, at ein handil upplýsti skeivan upprunaprís á vøru. Borgarin vísti á, at tann 9. desember 2022, var prísurin á vøruni var 298 kr. Seinni í desember hevði handilin tilboð, 50% av øllum vørunum í handlinum. Tá borgarin keypti vøruna tann 22. desember 2022, var upprunaprísurin ikki 298 kr., men í staðin 398 kr. Upprunaprísurin var sostatt hækkaður 100 kr.

Brúkaraumboðið hevur sambært marknaðarføringslógini eftirlit við marknaðarføring hjá vinnurekandi, og í § 9 í lóg um marknaðarføring er ásett at:

*“**§ 9.** Sølufremjandi tiltøk, eisini slík, ið geva eitthvørt framíhjá, t.d. avsláttarmerki, avsláttur, skipanir við eykaágóða og virðislønarkappingar, skulu marknaðarførast soleiðis, at tilboðstreytirnar eru týðiligar og greiðar fyri brúkaran og soleiðis, at brúkarin lættliga kann kunna seg um treytirnar. Týðandi upplýsingar, t.d. virði á eykaveitingum, sum greidliga kunnu avlaga búskaparligu atferð brúkarans, mugu ikki leggjast burturímillum.*

*Stk. 2. Útsøla ella onnur søla, har søluprísir eru lækkaðir, má bert fráboðast, um so er, at príslækkingin er verulig. Príslækkingin skal, um neyðugt, skjalprógvast.*

*Stk. 3. Tá søluprísir eru lækkaðir, skal prísmerkingin týðiliga vísa tann upprunaliga prísin á vørunum.”*

Um upplýsti upprunaprísurin ikki er rættur, kann talan vera um villleiðandi marknaðarføring, sambært § 3 í lóg um marknaðarføring, har ásett er: “*Tað er ikki loyvt at nýta skeivar upplýsingar ella leggja burturúr týðandi upplýsingar, um tær kunnu nýtast til týðiliga at avlaga búskaparligu atferðina hjá brúkarunum ella øðrum vinnurekandi á marknaðinum.*

*Stk. 2. Marknaðarføring, sum vegna innihald, form ella framferðarhátt er villleiðandi, ágangandi ella ávirkar brúkarar ella vinnurekandi á óhóskandi hátt, og sum kann nýtast til týðiliga at avlaga búskaparligu atferð teirra, er ikki loyvd.*

*Stk. 3. Upplýsingar um verulig viðurskifti skulu, um neyðugt, verða skjalprógvaðar.”*

Brúkaraumboðið hevur gjørt leiðreglur um marknaðarføring av prísi og vegleiðingar um sølufremjandi tiltøk og slagtilboð. Ásett er m.a., at tá lýst verður við niðursettum prísi, skal prísurin verða niðursettur í mun til egnan prís. Vinnurekandi skulu kunna skjalprógva at hava havt eina ávísa sølu av vøruni/tænastuni í einum tíðarskeiði, á minst seks vikur, beint undan søluátakinum. Tá talan er um gerandisvørur, er tíðarskeiðið minst fýra vikur.

Borgarin vísti á sølukvittan og mynd við upprunaprísi 298 kr., sum var tikin tann 9. desember 2022.

Handilin upplýsti, at talan var um eitt mistak, tí at vøran hevði aldrin kosta 398 kr. Rætti upprunaprísurin var 298 kr.

Borgarin fekk afturgoldið upphæddina, sum hann hevði goldið ov nógv fyri vøruna.

# Hotell broytti sølulýsing eftir áheitan frá Brúkaraumboðnum

Eitt hotell hevur eftir samskifti við Brúkaraumboðið broytt eina sølulýsing. Í sølulýsingini var upplýst ein prísur áljóðandi úr 399 kr. fyri dupultkamar. Kortini var ikki møguligt at bíleggja kamar fyri 399 kr. Einkultkamar kostaði 650 kr. og dupultkamar 798 kr.

Brúkaraumboðið vísti í skrivi til hotellið á, at tað er villleiðandi marknaðarføring um prísupplýsingar, og at í § 13 í lóg um marknaðarføring er krav um, at samlaður prísur verður upplýstur fyri tænastuna.

Í § 13 í lóg um marknaðarføring stendur:

*“**§ 13.** Í sambandi við vinnuligt útboð av vørum til brúkarar, tó undantikið søla av vørum á uppboðssølu, skal við merking, skelting ella á annan hátt týðiliga upplýsast um samlaða prísin fyri vøruna, íroknað til dømis ómaksgjøld, útreiðslur, meirvirðisgjald, fløskupant og líknandi, umframt øll onnur avgjøld. Avgjøld ella útreiðslur, sum tann vinnurekandi ikki hevur skyldu til at krevja beinleiðis frá brúkaranum, eru ikki fevnd av 1. pkt., men skulu upplýsast fyri seg. Verða vørur bjóðaðar út elektroniskt til brúkaran við møguleika fyri at bíleggja, eru 1. og 2. pkt. eisini galdandi.*

*Stk. 2. Stk. 1, 1. og 2. pkt. eru eisini galdandi í sambandi við vinnuliga sølu av tænastum til brúkarar á einum føstum handilsstaði, og tá tænastan verður bjóðað út elektroniskt til brúkararnar við møguleika fyri at bíleggja. Í førum, har tað ikki er møguligt at upplýsa samlaða prísin fyri tænastuna, skal kunnast um grundarlagið fyri at útrokna prísin, um hendan kunningin ger tað møguligt hjá brúkaranum sjálvum at rokna út endaliga prísin. Um tað vegna mongdina av útbodnum tænastum ikki er møguligt at lata prís ella útrokningargrundarlag fyri tær allar, skal prísurin ella útrokningargrundarlagið fyri eitt viðkomandi og umboðandi úrval av tænastunum upplýsast.*

*Stk. 3. Tá kunnað verður um prísir á vørum og tænastum í sølulýsingum, ella aðrari marknaðarføring, skulu upplýsingarnar lúka treytirnar í stk. 1 ella 2, § 14, umframt í reglum gjørdar við heimild í stk. 6. Um ein framleiðari, innflytari ella heilsøla í lýsingum ella á annan hátt skjýtur upp ein prís til víðarisølu til brúkararnar, skal greidliga tilskilast, at prísurin er vegleiðandi. 1. pkt. er eisini galdandi í sambandi við munnligar prísupplýsingar.”*

Brúkaraumboðið metti, at tá talan er um marknaðarføring við einum úr prísi og upplýst er, at talan er um dupultkamar, men møguligt er ikki at fáa eitt dupultkamar fyri henda prís, so er hetta villleiðandi sambært § 3. Eisini metti Brúkaraumboðið, at marknaðarføringin er brot á § 13, tí samlaður prísur á 798 kr. varð ikki upplýstur.

Brúkaraumboðið vísti á, at tilboðstreytirnar í sølufremjandi tiltøkum skulu, sambært § 9 í marknaðarføringslógini, verða greiðar og týðiligar, soleiðis at brúkarin lættliga kann kunna seg um treytirnar.

Hotellið broytti sølulýsingina soleiðis, at tað er greitt fyri brúkaranum, at tilboðið er galdandi fyri dupultkømur, tá tvey gista saman, og at prísurin tá er 399 kr. fyri hvønn.

# KAPITTUL 2

## ÓUMBIDNAR ÁHEITANIR

### Kappingar á sosialum miðlum

Brúkaraumboðið hevur viðgjørt nøkur mál um kappingar á sosialum miðlum.

Vísandi til leiðreglurnar á heimasíðuni hjá Brúkaraumboðnum, er ikki loyvt at krevja, at fólk skulu frámerkja/tagga onnur undir uppslagnum fyri at luttaka í eini kapping á sosialu miðlunum.

Brúkaraumboðið varð gjørt varugt við, at nakrar fyritøkur ikki høvdu yvirhildið ásetingina í § 6 um spammforboð í marknaðarførings-lógini.

Brúkaraumboðið hevur tískil valt tvey mál út, sum verða umrødd niðanfyri.

Tað fyrra málið snúði seg um eina bilasølu, sum hevði eina kapping á Instagram, har ein kundi vinna ein bilstól. Ein av treytunum fyri at luttaka var, at ein skuldi ”tagga 3 vinir”.

Tað seinna málið snúði seg um ein tónleikafestival, ið hevði eina kapping á Facebook, har ein av treytunum fyri at luttaka var, at ein skuldi frámerkja ein annan persón.

Brúkaraumboðið metti í báðum førum, at hetta var í stríð við spammforboðið í § 6 í marknaðarføringslógini, og heitti tí á bilasøluna og tónleikafestivalin um at steðga kappingunum alt fyri eitt. Brúkaraumboðið gjørdi somuleiðis vart við, at til bar at hava slíkar kappingar í framtíðini, men at hesar ikki skuldu verða treytaðar av, at fólk skuldu frámerkja onnur fyri at luttaka.

Fyritøkurnar tóku fráboðanirnar til eftirtektar, og Brúkaraumboðið gjørdi sostatt ikki meira við málini.

# Óumbidnar áheitanir til kundar hjá øðrum fjarskiftisveitara

Brúkaraumboðið fekk fráboðan frá borgarum um, at ein fjarskiftisfyritøka sendi út smsboð til kundarnar hjá einari aðrari fjarskiftisfyritøku, sum var farin á húsagang. Fjarskiftisfyritøkan sigur í smsboðnum, at tey sløkkja netið hjá fyritøkuni, sum var farin á húsagang, og bjóða kundunum simkort til teirra net ístaðin. Fjarskiftisfyritøkan bjóðar sær at koyra út til bústaðin hjá kundanum við simkortinum, og at skifta simkortið fyri kundan. Tann eini borgarin upplýsti, at hann hevði móttikið smsboðini mánakvøld kl. 18.42, har fjarskiftisfyritøkan upplýsti at netið bleiv sløkt mikumorgun kl. 8.00. Ein annar borgari vísti á, at hvørki treytir ella prísur viðvíkjandi nýggja haldinum var upplýst í smsboðnum, sum hann hevði fingið.

Brúkaraumboðið kannaði um talan var um brot á § 6 í lóg um marknaðarføring, tí smsboðini, ið send vóru kundunum hjá fjarskiftisfyritøkuni, sum var farin á húsagang, vóru send uttan samtykkið frá kundunum. § 6 ásetur, at: *"Tað er ikki loyvt í vinnuvirksemi at senda út lýsingar, ella á annan hátt at marknaðarføra, við elektroniskum samskifti so sum telduposti, sms, mms ella líknandi, sjálvvirkandi uppkallingarskipan, telefaxi ella telefon, uttan so, at móttakarin frammanundan hevur biðið um hetta."*

Fjarskiftisfyritøkan upplýsti, at tey høvdu leingi havt samband við leiðsluna í fjarskiftisfyritøkuni, sum var farin á húsagang, um at keypa kundarnar, men semja varð ikki funnin áðrenn fyritøkan fór undir trotabúðarviðgerð, og leiðslan misti tí allar heimildir. Fyri at avmarka peningaliga tapið, varð avgerð tikin um at sløkkja netið skjótast gjørligt. Fyritøkan lýsti við at tey tóku ímóti kundunum hjá fyritøkuni, sum var farin á húsagang, og at tey fegin hjálptu við at skifta simkortini. Lýsingin hevði staðið í 2 dagar, og áleið helvtin av kundunum høvdu fingið sær nýtt simkort. Fyritøkan metti kortini, at talan var um undantaksstøðu og avgjørdi tí at senda smsboð til kundarnar.

Heildarforboðið í § 6 ímóti óumbidnum elektroniskum og telefoniskum áheitanum eru reglur sum viðvíkja "beinleiðis marknaðarføring". Hetta er marknaðarføring, sum vendir sær beinleiðis til móttakaran. Greinin fevnir um áheitanir, ið innihalda lýsingar ella aðra marknaðarføring, umframt áheitanir, ið ikki nevna ítøkiligar vørur, veitingar ella tilboð. Ein marknaðarføringsáheitan er í fyrsta umfari ein áheitan har endamálið við henni er at ávirka keyp av vøru ella tænastu. Avgerandi er ikki, hvat áheitanin verður nevnd ella sær út at vera, men avgerðandi er, um tað vísir seg, at endamálið við áheitanini er marknaðarføring.

Brúkaraumboðið metti innihaldið í smsboðunum at verða marknaðarføring, sum vendi sær beinleiðis til móttakaran, og endamálið var at fáa kundarnar í fjarskiftisfyritøkuni, sum var farin á húsagang, at flyta yvir til hesa fjarskiftisfyritøkuna. Brúkaraumboðið staðfesti tískil brot á § 6 í lóg um marknaðarføring. Sambært § 28, stk. 3 í marknaðarføringslógini, verða brot á § 6 revsað við bót, uttan so at hægri revsing kann gevast eftir aðrari lóggávu.

Brúkaraumboðið fekk eftirfylgjandi fyrispurning frá fyritøkuni, sum hevði sent smsboðini, um undantaksloyvið kundi verða givið til § 6 í marknaðarføringslógini. Brúkaraumboðið kunnaði fyritøkuna um, at marknaðarføringslógin gevur ikki Brúkaraumboðnum heimild til at geva undantøk til reglurnar í § 6 um óumbidnar áheitanir í lóg um marknaðarføring

# KAPITTUL 3

## SAMANBERANDI LÝSINGAR

## Klædnahandil samanbar prísir við kenda lágprís handilsketu

Brúkaraumboðið varð gjørt varugt við, at ein klædnahandil í Føroyum hevði marknaðarført seg við, at hava samanborið sínar prísir við svensku lágprís handilsketuna H&M.

Brúkaraumboðið skrivaði í skrivi til handilin, at mett varð, at talan var um eina samanberandi lýsing eftir marknaðarføringslógini.

Brúkaraumboðið vísti harumframt á, at samanberandi lýsing er loyvd í ávísum førum, men at strangar treytir eru til slíkar lýsingar.

Niðanfyri er § 5 í marknaðarføringslógini endurgivin. Allar treytirnar í § 5 skulu verða loknar fyri, at ein vinnurekandi kann nýta eina samanberandi lýsing. Tað er serliga § 5, stk. 2, nr. 7, ið er viðkomandi í hesum førinum.

Marknaðarføringslógin ásetir, at ikki er loyvt, at brúka eina lýsing, har ein fær fyrimunir av tí umdømi, sum fylgir við vørumerki, fyritøkunavni, ella øðrum sereyðkennum hjá kappingarneyta, ella upprunamerking hjá framleiðslum, ið kappast verður við. Soleiðis sum Brúkaraumboðið sá málið varð brot framt á § 5, stk. 2, nr. 7 í marknaðarføringslógini, og heitti tí á handilin um at steðga við hesum lýsingum.

*“**§ 5.** Einhvør sølulýsing, sum beinleiðis ella óbeinleiðis vísir til ein kappingarneyta, ella til vørur ella tænastur, sum ein kappingarneyti bjóðar út, er samanberandi.*

*Stk. 2. Samanberandi lýsing, sbrt. stk. 1, er loyvd eftir hesi lóg, um samanberingin*

*1) ikki er villleiðandi,*
*2) viðvíkur vørum ella tænastuveitingum, sum nøkta sama tørv ella hava sama endamál,*
*3) er objektiv og samanber ein ella fleiri ítøkiligar og viðkomandi eginleikar, sum kunnu skjalprógvast, og sum eru umboðandi fyri hesar vørur ella tænastuveitingar, herundir eisini prísin,*
*4) ikki elvir til bland millum lýsara og kappingarneyta ella millum vørumerki, fyritøkunavn, onnur sereyðkenni, vørur, tænastur ella onnur viðurskifti hjá ávikavist lýsara og kappingarneyta,*
*5) ikki skapar misálit á ella lítismetir kappingarneyta ella vørumerki, fyritøkunavn, onnur sereyðkenni, vørur, tænastur ella onnur viðurskifti hjá kappingarneyta,*
*6) fyri framleiðslur við upprunamerking í hvørjum einstøkum føri viðvíkur vørur ella tænastur við somu upprunamerking,*
*7) ikki fær sær fyrimunir av tí umdømi, sum fylgir við vørumerki, fyritøkunavni, ella øðrum sereyðkennum hjá kappingarneyta, ella upprunamerking hjá framleiðslum, ið kappast verður við og*
*8) ikki lýsir eina vøru ella tænastu sum eina eftirgerð ella eitt avrit av eini vøru ella tænastuveiting, sum er umfatað av einum vardum vørumerki ella fyritøkunavni.”*

Niðurstøðan varð, at handilin tók fráboðanina frá Brúkaraumboðnum til eftirtektar, og Brúkaraumboðið gjørdi ikki meira við málið.

# KAPITTUL 4

## LÝSINGAR SKULU VERA Á FØROYSKUM

### Lýsingar, beinleiðis ætlaðar brúkarum í Føroyum, skulu vera á føroyskum

Brúkaraumboðið fekk fráboðan um, at ein føroyskur handil hevði givið út lýsingarblað á netinum, har allar nærlýsingarnar til vørurnar, vóru á donskum máli.

Brúkaraumboðið vísti á, at sambært § 7 a, stk. 1 í marknaðarføringslógini skal lýsingatilfar, sum er beinleiðis ætlað brúkarum í Føroyum, vera á føroyskum máli.

Marknaðarføringslógin er galdandi fyri alla marknaðarføring í Føroyum. Í lógini verður ikki skilt ímillum, hvørt lýsingartilfarið er ætlað føroyingum ella útlendingum, ið eru í Føroyum. Avgerðandi er, um talan er um marknaðarføring beinleiðis til brúkarar og um marknaðarført verður í Føroyum. Um so er, skal lýsingin ella lýsingartilfarið vera á føroyskum. Brúkaraumboðið metti, at lýsingarblaðið hjá hesum handli var ætlað sum marknaðarføring beinleiðis til brúkarar í Føroyum.

Reglurnar um føroyskt lýsingartilfar eru galdandi fyri allar lýsingarmiðlar og eru óheftar av, hvør tøkni verður brúkt. Lýsingarbløð, ið vinnurekandi, í Føroyum og úr øðrum londum, senda til føroysk húskið skulu vera á føroyskum. Aðrar lýsingar í bløðum, umframt lýsingar í útvarpi, sjónvarpi og á internetinum skulu sostatt eisini vera á føroyskum, tá endamálið er at fáa brúkaran at keypa vøru ella tænastu.

Handilin vísti á, at tað kann í summum føri vera trupult at uppfinna nýggj teknisk heitið til at útgreina tekniska kunning um vørurnar. Ásetingin í § 7 a er tó ikki grunda á nakra ávísa fatan av, hvat ið er føroyskt mál. Lýsingartekstir eru oftani á gerandismáli, og skulu lániorð og annað vanligt útlendsk árin á føroyskt tískil ikki útihýsast (t.d. at ein iPhone 11 hevur ein A13 Bionic). Brúkaraumboðið vísti tó á, at um vit hava vanlig føroyskt heiti fyri vøruna ella tænastuna, so skal tað brúkast. Harumframt skal kunningin um vøruna ella tænastuna verða á føroyskum máli.

# KAPITTUL 5

## FORHANDARMETING

### Bilasøla spurdi Brúkaraumboðið um forhandarmeting

Brúkaraumboðið fekk fyrispurning frá bilasølu, um hvørt ein nøgdsemiskanning frá einum donskum samstarvsfelaga eisini kundi gerast av kundunum hjá føroysku bilasøluni. Talan var um eitt spurnarblað á donskum máli. Bilasølan hevði kunnað danska samstarvsfelagan um, at føroyska marknaðarføringslógin krevur, at um talan er um marknaðarføringsvirksemi beinleiðis ætlað brúkarum í Føroyum, so skal tilfarið verða á føroyskum.
Bilasølan sendi Brúkaraumboðnum nøgdsemiskanningina og fyrispurning um nøgdsemiskanningin var at meta sum marknaðarføring.

Brúkaraumboðið hevur eftirlit við lóg um marknaðarføring og sambært § 2 í marknaðarføringslógini er lógin galdandi fyri privat vinnuvirksemi og alment virksemi, umframt fyri vinnuvirksemi hjá áhugafeløgum og felagsskapum, í tann mun vørur og tænastur verða bjóðaðar út á marknaðinum.

Brúkaraumboðið kunnaði bilasøluna um, at sambært kg. nr. 95 frá 12. nov. 2008 um marknaðarføring verður ein lýsing skilmarkað sum :

"1) øll kunning um vørur og tænastur og
2) øll kunning um vøru- og tænastuveitarar, ið lýsarar ella lýsingafyritøkur á einhvønn hátt senda ella varpa út til brúkarar, ella á annan hátt royna at gera brúkarar varar við."

Í nøgdsemiskanningini var m.a. mynd av bilum og búmerki. Brúkaraumboðið metti, at tá er talan um branding, ið er ein háttur at marknaðarføra. Branding sum marknaðarføring er fevnt av lógini, og talan var tískil um lýsing sambært kunngerðini. Brúkaraumboðið kom til tí niðurstøðu, at spurnarblaðið var fevnt av reglunum í § 7 a í lóg um marknaðarføring, og skuldi tí vera á føroyskum máli.

Brúkaraumboðið vísti eisini á, at sum meginregla er eitt spurnarblað ikki fevnt av § 6 (óumbidnar áheitanir), men tá talan er um branding, sum í hesum føri, verður telduposturin fevndur av § 6. Sambært § 6 í marknaðarføringslógini er ikki loyvt, at senda út lýsingar ella á annan hátt marknaðarføra við elektroniskum samskifti, so sum telduposti, sms, mms ella líknandi, uttan so at móttakarin frammanundan hevur biðið um hetta.

# KAPITTUL 6

## STAKROYNDIR

## Stakroyndir av tilboðsbløðum

Brúkaraumboðið ger javnan stakroyndir av tilboðsbløðum, ið verða borðin út til hvørt húsarhald í Føroyum. Við stakroyndum verður millum annað kannað um marknaðarførdu uppruna- ella fyrrprísir eru rættir.

Í 2022 gjørdi Brúkaraumboðið stakroyndir av tilboðsbløðum hjá veitarum av húsbúnaði og búnýti á føroyska marknaðinum.

Tá fyritøkur marknaðarføra, at ein vøra verður seld fyri niðursettan prís, so skal tað í fyrsta lagi verða satt, og í øðrum lagi skal upprunaligi prísurin upplýsast. Hetta merkir, at fyritøkur í minst seks vikur (fýra vikur fyri gerandisvørur) skulu hava havt vøruna til sølu til upplýsta upprunaprísin.

Um upplýsti upprunaprísurin ikki er rættur, er talan um villleiðandi marknaðarføring, sambært § 3 í marknaðarføringslógini. Sambært § 9, stk. 2 í marknaðarføringslógini, má útsøla ella onnur søla, har søluprísir eru lækkaðir, bert fráboðast, um so er, at príslækkingin er verulig. Príslækkingin skal, um neyðugt, skjalprógvast.

Stakroyndirnar hjá Brúkaraumboðnum vístu, at fyritøkurnar megnaðu at skjalprógva marknaðarførdu upprunaprísir. Tó hevði ein fyritøka verði uttan handilsleiðara í eina tíð, sum hevði viðført at mannagongir viðvíkjandi prísum og goymslustýring ikki høvdu verið nóg greiðar. Samanhildið við, at nýggjur handilsleiðari júst varð settur, gjørdi Brúkaraumboðið í hesum umfari ikki meira við prískanningarnar. Fyritøkan fekk kortini kunning um, at Brúkaraumboðið ger nýtt eftirlit seinni.

Leiðreglur hjá Brúkaraumboðnum um marknaðarføring av prísi kunnu lesast her: Leiðreglur um marknaðarføring av prísi – (bruk.fo)

# KAPITTUL 7

## GJALDSLÓGIN

### Skylda at taka ímóti reiðum peningi

Brúkaraumboðið fekk fráboðan frá borgara um, at matstovan Etika ikki tók ímóti kontantum. Hetta er krav sambært § 81 í gjaldslógini, sum sigur, at um tikið verður ímóti gjaldskortum ella fargjalding um app, skal eisini kunna takast ímóti reiðum peningi. Brúkaraumboðið hevur eftirlit við at kontantreglan í gjaldslógini verður hildin, og hevur í hesum sambandi vent sær til Etika við kunning og áminning um at halda kontantregluna. Kontantreglan hevur sum endamál at forða fyri, at mismunur verður gjørdur á kontantkundum, og tí mugu gjaldsforðingar ikki verða settar, ið bara eru galdandi fyri kontantkundar. Tað kann tí ikki verða farið uttan um regluna við t.d. at nokta at taka ímóti reiðum peningi, ella at gloyma at hava pengar at veksla við.

Viðkomandi lógargrein:

**§ 81, stk. 1** í gjaldslógini: *"En betalingsmodtager er forpligtet til at modtage betaling med kontanter i tidsrummet fra kl. 06.00 til kl. 22.00, hvis denne modtager betalingsinstrumenter omfattet af denne lov, jf. dog stk. 2, 3 og 5."*

Skyldan at taka við reiðum peningi er tó ikki galdandi fyri fjarsølu, sum t.d. sølu um netsølu (webshops) og onnur sløg av sølu um internetið og um telefonina. Kontantreglan er heldur ikki galdandi fyri gjalding í ómannaðum sjálvavgreiðslustøðum, sum t.d. ómannaðar bensinstøðir, sbr. § 81, stk. 2 í gjaldslógini.

Brúkaraumboðið metir ikki, at Etika kemur undir undantakið til skylduna at taka ímóti reiðum peningi. Brúkaraumboðið hevur tí kunnað og mint Etika á, at tá Etika tekur ímóti gjaldskortum, hevur Etika eisini skyldu at taka ímóti kontantum.

Etika viðmerkir at tey steðgaðu við at taka ímóti reiðum peningi, eftir nøkur innbrot, har peningur og fløskur hvurvu. Etika boðar frá, at tey fara at seta ein kassa upp, og fara at taka ímóti reiðum peningi aftur. Brúkaraumboðið ger tí ikki meira við málið.

## Keyp á netinum, ikki fingið vøruna

Brúkaraumboðið fekk fráboðan frá borgara, sum hevði bílagt gerandisvøru frá einum nethandli fyri fimm vikum síðan, men hevði ikki móttikið vøruna. Borgarin hevði goldið 527,00 kr. fyri vøruna sama dag, sum hann hevði bílagt vøruna. Borgarin hevði gjørt nethandilin varugan við at vøran ikki var komin, bæði við at ringja og skriva teldupost, men hevði ikki fingið svar.

Brúkarumboðið hevur eftirlit við einum parti av gjaldslógini. Gjaldslógin kom í gildið í Føroyum 1. juli 2021. Tá talan er um fjarsølu, ásetir § 112 í Gjaldslógini, at tá ein brúkari keypir vørur og tænastur á netinum ella umvegis telefon, skal bankin hjá brúkaranum gjalda peningin aftur á konto hjá brúkaranum, um brúkarin ger fylgjandi krav galdandi:

*"1. Fyritøkan hevur ikki veitt bíløgdu vøruna ella tænastuna*
*2. Fyritøkan hevur trekt eina upphædd, ið varð hægri enn avtalað, ella*
*3. Brúkarin hevur gjørt brúk av iðranarrætti sínum, áðrenn vøran ella tænastan varð veitt."*

§ 112 sigur harafturat, at áðrenn eitt slíkt krav, skal brúkarin hava sett seg í samband við gjaldsmóttakaran við kravið um antin afturgjald av peningaupphædd ella krav um veiting av vøru ella tænastu.

Brúkaraumboðið bað borgaran venda sær til peningastovnin, ið varðar av gjaldskortinum skjótast gjørligt, og heita á tey um at fáa í lag, at peningurin verður fluttur aftur. Gjaldslógin hevur eina endaliga freist uppá 13 mánaðar (frá tí degi peningurin er farin av kontuni), har borgarin skal gera kravið galdandi mótvegis peningastovninum.

## Elektroniskt gávukort

Ein borgari gjørdi Brúkaraumboðið vart við, at hann hevði eina peningaupphædd standandi á einum elektroniskum gávukorti til ein handil, ið seldi undirklæðir í Føroyum. Handilin varð latin aftur, og borgarin stóð nú við gávukortinum, sum hann ikki fekk brúkt. Borgarin ynskti at fáa peningin útgoldnan.

Elektronisk gávukort eru í ávísum førum fevnd av § 96 í gjaldslógini.

Brúkaraumboðið vegleiddi borgaranum um, hvussu hann kundi seta seg í samband við donsku handilsketuna fyri at fáa peningin afturgoldnan.

Í § 96 gjaldslógini stendur soleiðis skrivað um elektroniskan pening (t.d. elektronisk gávukort):

*"**§ 96.** Udstedere af elektroniske penge må ikke udstede elektroniske penge til overkurs.*
*Stk. 2. Indehavere af elektroniske penge kan inden udløbet af de elektroniske penge og i op til 1 år efter udløbet anmode om, at restværdien indløses til pålydende værdi.*
*Stk. 3. Anmoder indehavere af elektroniske penge om indløsning efter udløbet af de elektroniske penge, jf. stk. 2, og udøver udstederen af elektroniske penge aktiviteter som nævnt i § 18, stk. 1, nr. 2-4, og er det ikke*

*på forhånd kendt, hvilken andel af midlerne der skal anvendes til elektroniske penge, skal udstederen af elektroniske penge indløse alle de midler, som indehaveren af elektroniske penge har anmodet om.*
*Stk. 4. Der kan kun opkræves gebyr i forbindelse med indløsning, hvis dette fremgår af aftalen, og kun, hvis*
*1) der kræves indløsning inden de elektroniske penges udløb,*
*2) aftalen mellem udstederen og indehaveren indeholder en udløbsdato og indehaveren af de elektroniske penge opsiger aftalen inden denne dato eller*
*3) der kræves indløsning mere end 1 år efter udløbet af aftalen mellem udstederen og indehaveren.*
*Stk. 5. Et eventuelt gebyr som nævnt i stk. 4 skal svare til de faktiske omkostninger for udstederen af elektroniske penge, medmindre omkostningerne er uforholdsmæssigt høje.*
*Stk. 6. Indløsningsbetingelser og gebyrer skal klart fremgå af rammeaftalen mellem udstederen og indehaveren. Indehaveren af de elektroniske penge skal oplyses om disse betingelser, før vedkommende bliver bundet af en aftale.*”

Niðurstøðan í málinum varð, at danska handilsketan flutti peningin á kontu hjá borgaranum.

# **Vegleiðingar** og kunning



# Kappingar á sosialum miðlum

Virkjum er loyvt at brúka kappingar sum lið í marknaðarførslu, eisini kappingum sum eru treytaðar av keypi. Virkið skal hóast tað, altíð gera brúkarnar varugar við treytirnar fyri at luttaka í kappingini; tað merkir, hvørji serkrøv knýta seg at luttøkuni.

Treytir fyri eini kapping skulu verða týðilig og gjøgnumskygd hjá brúkaranum at lesa og skilja.

**Kappingar á sosialum miðlum**

Sum heild eru somu reglur galdandi fyri kappingar á netinum og sosialu miðlunum sum aðra staðni. Kor og treytir fyri kappingini skulu vera týðiliga frámerkt, so lesarin lættliga sær, hvørjar treytir eru heftar at luttøkuni.

Brúkaraumboðið fær javnan fráboðanir frá borgarum um kappingar á sosialu miðlunum, sum eru í stríð við spammforboðið í § 6, stk. 1, í lóg um marknaðarføring. Tað fevnir aloftast um tann sama trupulleikan, sum er, at tann vinnurekandi biður borgaran frámerkja/tagga ein vin í viðmerkingunum fyri at luttaka í kappingini. Tað er ikki loyvt at seta tað sum eina treyt, at borgarin skal frámerkja/tagga ein annan fyri at luttaka í eini kapping.

Heldur ikki er tað loyvt at leggja upp til, at fólk frámerkja/tagga ein vin ella ein persón fyri at luttaka í eini kapping. Dømi um hetta kann eitt nú verða, “*Fortel okkum, hvørjum tú kundi hugsað tær at fari á festival við*”. Henda máliskan leggur upp til, at fólk frámerkja onnur í viðmerkingunum, hóast at orðingin ikki beinleiðis biður fólk frámerkja/tagga.

Tað er loyvt at biðja fólk dáma og deila síðuna ella uppslagið fyri at luttaka í kappingini, ella at biðja borgaran viðmerkja eitthvørt, sum ikki er tengt av, at persónurin viðmerkir navnið á einum øðrum (frámerkir).

Brúkaraumboðið hevur gjørt eitt yvirlit yvir reglurnar í marknaðarføringslógini, har ein sær, hvat ikki ber til at gera og hvat til ber at gera í kappingum á sosialu miðlunum. Yvirlitið sæst á næstu síðu.

**Kappingar til børn og ung**

Tá ið virki marknaðarføra seg t.d. ígjøgnum kappingar mótvegis børnum og ungum, galda skerpað krøv. Tað merkir, at virkini skulu ansa serliga væl eftir, at børn og ung skilja kappingarreglurnar, og at tey hava fingið at vita, at kappingin er liður í marknaðarførsluni hjá virkinum.

# Kappingar á sosialum miðlum

## Yvirlit yvir reglurnar í marknaðarføringslógini

### Hetta kanst tú gera:

- Tú kanst gera eitt uppslag á tínum egna vanga ella síðu.
- Tú kanst biðja fólk skriva eina viðmerking fyri at luttaka - t.d. “Viðmerk undir uppslagnum hvønn lit tær dámar best”.
- Tú kanst biðja fólk dáma eina síðu fyri at luttaka.
- Tú kanst biðja fólk dáma og deila eitt uppslag fyri at luttaka.

### Hetta kanst tú IKKI gera:

- Tú kanst ikki krevja, at fólk skulu senda eini privat boð við marknaðarføring fyri at luttaka.
- Tú kanst ikki krevja, at fólk skulu frámerkja ein vin í uppslagnum fyri at luttaka.

Les meira á bruk.fo

Brúkaraumboðið

# Black Friday

**Black Friday – góð ráð**

Brúkaraumboðið gjørdi í november eina vegleiðing um góð ráð til brúkarar og vinnurekandi í samband við, at tilboðini til Black Friday nærkaðust.

Har stóð m.a. soleiðis skrivað:
Tá marknaðarført verður við "útsølu", "tilboð", "Black Friday prísur" ella líknandi, er týdningarmikið, at prísurin veruliga er lækkaður, og at gamli fasti prísurin (undanprísurin) er upplýstur. Undanprísir skulu vera sannir. Vanliga skal lægsti undanprísur framman undan søluni vera settur á, og vøran skal veruliga verða seld fyri tann prísin.

Meginreglan er, at undanprísurin skal hava verið galdandi í minsta lagi 6 vikur, áðrenn tilboðið kemur í gildi. Fyri gerandis- og árstíðarbundnar vørur (t.d. mat og jólaprýði) er kravið 4 vikur.

Brúkaraumboðið heitir á øll vinnurekandi um at seta seg væl inn í regluverkið, soleiðis at marknaðarføringin ikki verður villleiðandi og ólóglig.

**Nøkur góð ráð til tann vinnurekandi:**

Minst til at upplýsa undanprísin á vøruni. Undanprísurin skal vera brúktur í rúma tíð áðrenn tilboðið byrjar.

Tað skal vera heilt greitt fyri brúkaran, um vøran verður seld fyri niðursettan prís ella ikki.

**Nøkur góð ráð til brúkaran:**

Kanna um vøran veruliga er niðursett – hvussu nógv er at spara?

Lat teg ikki blenda av tilboðunum – kanska er vøran bíligari í einum øðrum handli/nethandli.

Um tú keypir bil, innbúgv ella líknandi og í tí sambandi tekur lán – kanna samlaðar kredittútreiðslur.



# Tóm orð skulu ikki brúkast í marknaðarføring

**Greenwashing – tá vørur verða marknaðarførdar sum grønari enn tær eru**

Greenwashing er eitt altjóða heiti, ið verður nýtt, tá vinnurekandi marknaðarføra eitt nú egnar vørur sum verandi meira umhvørvisvinarligar ella burðardyggar enn tær í veruleikanum eru.

Fyritøkur og vinnurekandi eiga at hugsa seg gjølla um áðrenn føgur orð, sum *burðardygd*, *umhvørvisvinarlig* ella etiskir fyrimunir verða knýtt í marknaðarføringina.

Brúkaraumboðið hevur gjørt eina vegleiðing til vinnurekandi um, nær og hvussu hesi orð kunnu brúkast í marknaðarføringini.

Vørur ella tænastur kunnu ikki bara lýsast sum burðardyggar ella umhvørvisvinarligar, uttan nærri verður greitt frá, á hvønn hátt orðini skulu skiljast.

Ein meginregla í lógini um marknaðarføring er, at brúkarin ikki má verða villleiddur av lýsingum av eini vøru ella eini tænastu. Tann vinnurekandi eigur at geva brúkaranum eina heildarfatan av eini vøru ella tænastu, sum er sonn. Hetta merkir eisini, at um ein partur av vøruni til dømis er endurnýtslutilfar, so eigur greitt at lýsast, at hetta er ikki øll vøran.

Samstundis sigur Brúkaraumboðið í vegleiðingini, at tað skal skiljast sum brot á lógina um marknaðarførslu, um týðandi upplýsingar verða lagdar burturúr ella tagdar, tá marknaðarføringin leggur seg eftir at lýsa við orðum, sum kunnu villleiða brúkaran.

Í vegleiðingini verður eisini lýst, at tá slík positiv orð verða nýtt, so skal tað kunna skjalprógvast, at upplýsingin er sonn. Skjalprógvini skulu vera tøk, tá farið verður undir marknaðarføringina.

Í summum førum ber til at skoyta beinleiðis upp í til dømis eina lýsing, hvussu brúkarin skal skilja eitt uppáhald, har sagt verður, at ein vøra ella ein tænastu hevur serligar eginleikar innan eitt nú umhvørvisvernd.

Umframt at knýta hesi orðini, at avísum vørum, so kunnu orðini eisini knýtast at sjálvari fyritøkuni, men eisini tá krevst, at uppáhaldini kunnu skjalprógvast. Sum dømi um almenn og ógreið uppáhald nevnir Brúkaraumboðið setningin ”Vit geva tær ein grønan fyrimun”. Verður ein líknandi setningur nýttur í markaðarføringini eigur frágreiðing at fylgja við, hvussu hetta skal skiljast ella skal vísast til heimasíðu ella annað tilfar, sum skjalprógvar, at setningurin er sannur og ikki villleiðandi.

Vegleiðingin er ein kunning til vinnurekandi um, hvussu Brúkaraumboðið ætlar at handhevja marknaðarføringslógina, tá tað snýr seg um at nýta orð, sum burðardygd og umhvørvisvinarligt í marknaðarføringini. Brúkaraumboðið hevur brúkt norsku vegleiðingina um hetta evnið sum fyrimynd.



# Norðurlendsku brúkaraumboðini hittust í Føroyum

Í juni hittust brúkaraumboðini úr Danmark, Føroyum, Finnlandi, Grønlandi, Íslandi, Noregi og Svøríki í Føroyum at skifta orð um vanligar brúkara – avbjóðingar og útinnandi arbeiðslag. Norðurlendsku brúkaraumboðini samdust um, at talgild manipulerandi tøkni sum t.d. dark patterns og umfatandi arbeiðið at slóða seg fram á og eyðmerkja brúkarar, sum endar við miðvísum persónligum lýsingum, eru stórar forðingar á einum vælvirkandi brúkaramarknaði. Norðurlendsku brúkaraumboðini hava tí bundið seg til at arbeiða fyri sonnum talgildum rættvísi og virðing fyri tí, ið brúkarin velur.

**Brúkaranna sjálvræði í vanda**

Tað er vorðið alsamt truplari hjá brúkarum at taka frælsar, óheftar og væl grundaðar avgerðir uttan, at handilsvirki blanda seg uppí og manipulera við síni tøkni. Dátusamansetingin av áhugamálum og atburði hjá brúkarum, nýtslan av sálarfrøðiligum mekanismum og klókum algoritmum eru vorðin máttmikil amboð, ið reka brúkarar til avgerðir, sum teir kanska als ikki ætlaðu at taka. Tann viðbrekni brúkarin kann verða misnýttur, tá ið handilsvirki grava djúpt í privatlívi hjá fólki fyri at ávirka keypsvanarnar. Vilja vit hava ein marknað, har brúkarar, ið hava sýnt áhuga fyri pengaspølum, á sínum sosialu miðlakontum verða álopnir við tilboðum um brúkarakredittir? Sjálvandi er svarið nei.

**Norðurlendsk átøk at berja niður manipulerandi tøkni**

Norðurlendsku brúkaraumboðini eru tí samd um at økja norðurlendsku arbeiðsorkuna til talgilda og dátustýrda handilssiðvenju. Arbeiðsorkan fer at halda fram við sínámillum arbeiðinum fyri at kunna um besta arbeiðslag, men fer eisini fyri at taka tøk saman at berja niður talgilda og dáturikna siðvenju, sum hevur so ógvisliga ávirkan á brúkaraval og avgerðir. Harumframt fara norðurlendsku brúkaraumboðini við sameindari styrki at halda fram at hækka støðið og fáa eina betri fatan av, hvussu hesin framferðarháttur ávirkar brúkararnar. Hetta er eitt týðandi næsta stig hjá norðurlendsku brúkaraumboðunum í arbeiðinum fram ímóti sonnum talgildum rættvísi á brúkaramarknaðunum.



Umboð fyri norðurlendsku brúkaraumboðini á fundi í Føroyum.